# Lokalir leikarar

GÍ hevur gjørt avtalur við tríggjar av sínum egnu spælarunum. Eini spælarin kemur heimaftur eftir eitt ár í øðrum felag. Ársins leikari í GÍ farna kappingaár Sam Jacobsen heldur fram í felagnum, og tað ger Símun Louis Jacobsen eisini. Harafturat fáa teir Hanus Jacobsen aftur í hópin, eftir at Hanus seinasta árið hevur roynt seg í AB.




# Leirvíkingar á felagslið

GÍ og LÍF hava lagt síni bestu fótbóltslið saman, og nú sæst ein avleiðing av hesum. GÍ/LÍF hevur nevniliga gjørt sáttmála við tríggjar leirvíkingar fyri næsta kappingarár. Magnus Skoralíð skifti longu í summar til GÍ at spæla, og nú fara eisini Andreas Lava Olsen og Sølvi Vatnhamar at royna seg í Formulahópinum hjá felagsliðnum. Umframt leirvíkingarnar hevur GÍ/LÍF eisini gjørt avtalu við unga álopsspælaran Finnur Justinussen.




*Durita Christoffersen var besti málskjúttin í báðum dystunum móti íslandi. Og við hesum prógvaði hon, at hon kann bera byrðuna sum fyrsta val á høgra bakki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ikki nóg kaldar

**Serliga seinni landsdysturin móti íslendsku U21-kvinnunum sýndi góðar taktir. Men okkara megnaðu ikki at halda høvdið kalt, tá mest stóð á**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt misnýtt brotskast, og mest sum blackout í 6 móti 4 yvirtalsstøðu. Hetta kostaði føroyska kvinnulandsliðnum dýrt, tá tær spældu seinna landsdystin móti íslendska U21-liðnum.

Tá brotskastið varð misnýtt, stóð 23-22 á talvuni, og Ísland hevði júst fingið aðru útvísingina á rað. Simona Hansen traðkaði tó ov langt fram, tá hon sendi bóltin í meksarnar, og ístaðin vann Ísland seg upp 24-23. Ein støða, ið tó ikki helt sær, tá Simona langaði seinasta bóltin í kassan til endaliga úrslitið.

So hóast hitastigini í nýggju og vøkru høllini í Klaksvík mest líktist kuldastigum, so megnaðu okkara altso ikki at halda høvdinum kalt, tá mest stóð á.

### Sakna bakkar

Meira enn úrslitið, so var tó áhugavert at síggja, í hvønn mun føroyska liðið hevur ment seg. Grundarlagið fyri slíkari sammeting er kanska dekan ov tunt, tá uppgávurnar hava verið ógvuliga fáar og spjaddar. Men nakrir positivir tendensir vóru avgjørt at hóma.

Ikki minst var hugaligt at síggja, hvussu væl okkara megnaðu at dekka offensivt í samfullar 60 minuttir. Hetta krevur sjálvandi nógva orku, men við at rotera millum spælararnar, fekst hetta at rigga væl, tó at konsentratiónin í løtum hevði hug at svíkja.

Og hugaligt var tað eisini at staðfesta, at tað hóast eru onkrir bakkar við góðari skotstyrki. Júst bakkplássini hava ofta verið nevnd sum ein trupulleiki hjá Føroyum, tí útlendsku spælararnir mest sum hava patent upp á hesi í feløgunum. Men avrikið hjá Duritu Christoffersen vísti, at her stendur nú ikki heilt so illa til. Simona Hansen er nú spælarin við drúgvastu royndunum á plássinum, og á síðulinjuni er eisini ein Rebekka Justinussen, sum væl og virðiliga hevur skotstyrkina, sum skal til.

Hinvegin er støðan ikki eins góð á vinstra bakki. Sjálvandi var tað ikki nummar eitt, at Annika Ljósstein mátti geva avboð til dystirnar hesaferð, og hon vildi verið upplløgd á plássinum. Men tað er spell, at landsliðsvenjarin í longum løtum noyðist at brúka Joan M. Djordjevic á bakkplássinum. Hetta megnaði hon tó hampuliga væl, men fleiri ferðir sýndu rennibanarnir, at hon er miðspælari burturav.

Her er ein loysn møguliga ávegis, nú Stjørnan arbeiðir við at fáa føroyskt pass til Simonu Petersen. Men tað skerst ikki burtur, at tá vinstri bakkur hjá teimum fýra ovastu feløgunum verður uppfikin av útlendskum profili, so verður truplari hjá teimum føroysku spælarunum at etablera seg á plássinum.

### Rammur mugu skapast

Arbeiðið við kvinnulandsliðnum hevur verið eitt sindur on og off seinastu 7-8 árini, men ætlanin er so, at hetta nú skal koma í eina fastari legu.

Eftir dystin staðfesti venjarin, Sophus Dal-Christiansen, at ætlanin er at hava fýra fastar aktivitetir um árið, soleiðis at spælararnir alla tíðina høvdu nakað at arbeiða fram ímóti. Hvørjir hesir aktivitetir skulu verða, er tó ikki fastlagt.

– Menning krevur, at spælararnir støðugt fáa avbjóðingar. Eitt gott dømi er væl endin av dystinum í dag, har spælararnir ikki eru nóg kaldar, tá vit hava møguleikan at avgera dystin. Tað er nakað, sum bert kann venjast við at spælararnir fáa neyðugu royndirnar, helt Sophus.

Ein møguleiki er sjálvandi Challenge Trophy-kappingin, har Føroyar tvær ferðir hava tikið lut, men í løtuni er hetta ikki avgjørt.

- Vit bíða fyrst og fremst eftir, hvør avgerðin hjá EHF verður um hetta. Er leisturin tann sami, sum hann var seinast, so er lítil menning í at senda okkara sterkastu kvinnur avstað, sigur Kristian Johansen, formaður í HSF.

Hann sigur, at endaliga avgerðin um formin, sum kappingin verður skipað eftir, verður tikin í desember, og tá fer HSF so at gera av, um talan eisini verður um føroyska luttøku – møguliga eisini vertsskap.

## FAKTA

**Føroyar-Ísland 17-22 (10-14)**
**10 min:** 2-7
**20 min:** 6-9
**40 min:** 11-16
**50 min:** 16-19
**Málskjútar**
**Føroyar:** Durita Christoffersen 6(1), Fríða Marjunardóttir 4(1), Simona Hansen 3(1), Ninna Kristin Johansen 1, Joan Midjord Djordjevic 1, Ása á Neystabø 1, Unn Kragesteen 1
**Ísland:** Stella Sigurðardóttir 5, Kristin Collins 5, Karin Káradóttir 3, Sanna Jónsdóttir 3, Hildur Tórgeirsdóttir 2(2), Ester Oskarsdóttir 1, Arna Erlingsdóttir 1, Svinna Maria Einarsdóttir 1, Rebekka Skúladóttir 1
**Brotskøst:** Føroyar 3, Ísland 2
**Útvísingar:** Føroyar 1, Ísland 1
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

**Føroyar-Ísland 24-24 (11-12)**
**10 min:** 3-5
**20 min:** 7-8
**40 min:** 16-15
**50 min:** 19-21
**Málskjúttar**
**Føroyar:** Durita Christoffersen 5(1), Ása á Neystabø 5, Joan Midjord Djordjevic 4, Simona Hansen 4, Una Olsen 3, Fríða Marjunardóttir 2, Anja Heinadóttir 1
**Ísland:** Hildur Tórgeirsdóttir 7(3), Kristin Collins 7, Stella Sigurðadóttir 5, Rebekka Skúladóttir 3, Svinna Maria Einarsdóttir 2
**Brotskøst:** Føroyar 3, Ísland 4
**Útvísingar:** Føroyar 1, Ísland 2
**Dómarar:** Rúni Mohr & Ragnar Simonsen

# Vóru klárari



- Stóri munurin á dystinum í gjár og í dag var, at vit hesa ferð vóru klárar frá fyrsta bríksli. Sjálvandi fingu vit eisini broytt nakað um spælið, tí vit sóu, at tað riggaði væl at verja offensivt móti teimum.

Soleiðis segði Joan Midjord Djordjevic, tá vit eftir dystin sunnudagin spurdu hana, hvør stóri munurin á teimum báðum dystunum var.

Tit fara eitt sindur niður í tempo í løtum. Var tað ov tungt at verja somikið offensivt?

- Tað var tungt í øllum førum. Tað krevur jú nógv meira renning, og so verður tað strævið.

Og hóast føroyska liðið móti dystarenda misti takið, tá dysturin skuldi avgerast, so vóru bæði Joan og liðfelagarnir munandi betri nøgdar um dystin sunnudagin.

- Tað er einki at ivast í. Sjálvandi er tað keðiligt, at vit kiksa har í endanum. Men sum heild gjørdu vit færri mistøk, enn vit gjørdu í gjár, og vit spæla ein nógv betri dyst. So vit eru rættiliga væl nøgdar um avrikið hesaferð, helt hon.

**-mørk**